# Ein vøkur løta undir sólini

**Troubadoururin Teitur fekk á ársins Roskilde Festivali heiðurin at opna stóra Orange Pallin, har mong stórfingin løta er farin fram, og har mangt eitt viðurkent tónleikanavn hevur staðið á palli gjøgnum árini**

*Knút H. Eysturstein*
*eysturstein@yahoo.co.uk*



Teitur byrjaði róliga og í góðum stíli við hugsunarsama sanginum »Guilt by Assosiation«. Hevði Gretsch gittara og violinboga í hond, og við violinboganum streyk hann varliga eftir gittaranum, so atmosferiskar og hugvekjandi ljóðfladur komu flótandi úr stóru hátalarunum. Bólkurin kom uppí, og Teitur og bólkur framførdu eina minimala og einfalda útgávu av sanginum, sum riggaði væl. Varliga uppleggið stóð sum ein sterk og góð kontrast til stóra Orange pallin, ið annars mangan hevur verið karmur um meira buldruttar tónar.

## Eingin slingur

Vid Teiti á palli vóru blásarar, og tað sum sá út til at vera eitt føroyskt gentukór. Tad gjørdist skjótt greitt, at tað riggaði væl vid gentukórinum afturvið, og útsetingarnar til blásarar vóru framúrskarandi í ljóðmyndini. Eisini vóru gittarar, klaver, percussion, marimba, glockenspiel og annað væl valt habengut sloppið vid á pallin, og tað riggaði eisini væl. Mest tí at botnurin var tryggur og góður; Derek Murphy á trummum og Mikael Blak á bassi hava spælt leingi vid Teiti, og har er eingin slingur í valsinum!

»Louis Louis« elvdi skjótt til nógv klapp millum áhoyrarарnar, og felagssangurin rungaði í niðurløgunum. Teitur var allan vegin í gjøgnum í góðum hýri; chillaður, avslappaður, men eisini fokuseraður og við uppá tað. Sá út til at kenna seg heima á pallinum.

## Staðfesting av viðurkenning

Sigast kann, at konsertin var ein staðfesting av, at Teitur og tónleikur hansara hevur fingið afturljóð í norðanlondum og aðrastaðni við. Nógv fólk vóru uppmøtt, og tey livdu væl við í konsertini. Tó vóru summi, sum høvdu hug at fara, tá konsertin var hálvrunnin, kanska mest tí at her ikki var talan um beinleiðis veitsluhugaðar tónar, men meira hugvekjandi og reflektivar av slagnum. Her var á ongan hátt talan um eina apufest, og var tað tað, ið man ætlaði sær, so fór man lort í býin. Vit, sum eftir vóru, livdu væl við í tónleikinum.

Hóast løtan sum heild var av meira friðarligum slag, fekk stak dansabli »Catherine the Waitress« lív í føturnar (»fut i fejemøget«, sum skaldið John Mogensen tók til á sinni), og fólk dansaðu heilt fitt afturvið lagnum. Taktføstu løgvabrestirnir rungaðu. »Hitchhiker« groovaði eisini avstað í einum lekrum feeli, har ikki sørt rock n roll kendir undirtónar sníktu seg upp úr musikkinum. Teitur royndi seg við meira frekligum gittarlótum, og endin var eitt satt gittar rock freakout, har teymarnir vóru sleptir eina løtu. Hetta riggaði ordiliga væl. Talan var hóast alt um Orange, ikki so? Hvørt hetta meira sýraða innslagið var ein heilsan til noise rock legendurnar My Bloody Valentine, ið spæla á Roskilde leygarkvøldið, skal her vera ósagt!

Hinvegin var alt meira vakurt og friðsælt í frálíka »You get me«, og »Legendary Afterparty« var rørandi »skeivur« og lívligur uppá tann feita mátan. Sangurin er um gittarleikaran Chris Whitley, sála, ið Teitur møtti einaferð, og hesa løtuna á Dyrskuepladsen gjørdist hann ein hásongur til tónleikin og lívið. »Einki nýtt er undir sólini«, skrivaði Prædikarin fyri eini 2250 árum síðani, men sumt av tí, sum er her, er vakurt alíkavæl. M.a tónleikur, tá hann elir fram hitt djúpasta og sannasta í menniskjum. Bæði teim sum framføra, og teim sum taka ímóti. Yvirhøvur var her talan um eina vakra løtu undir sólini.

## Góður tónleikur

Teitur og væl mannaði bólkurin spældu eina góða og avslappaða konsert. Hóast flottu og semi-hypaðu umstøðurnar á Orange, tóku tey tað róligt; vóru ikki komin fyri at royna at imponera nakran; at fáa eina ella aðra ímyndaða grýtu uppá kók, men at spæla góðan tónleik. Tað gjørdu tey eisini, og tá avtornar, er tað tað, sum imponerar; góður tónleikur.

Sólríka og vakra løtan endaði vid, at Teitur stillaði seg einsamallur fremst, meðan bólkurin fór av pallinum. Síðani framførdi hann heitislagið av nýggjastu plátuni »The Singer«, púra einsamallur og uttan fylgispæl. Hetta var fryktiliga kul, og undirstrikaði enn betri kontrastin millum »stóru« umstøðurnar og minimala tónleikin. Teitur sang inniliga frammanfyri stóru mannamúgvuni, og vit tóku gleðiliga ímóti; »We raise our voice in unison, at the end of every show...«

Ja, tað var líka við.

*»Á ein ella annan hátt var lívið bara uppsummerað eitt sindur hesa løtuna«*

*- Búi Rouch*

FØROYA HANDILSSKÚLI

## HD-útbúgvingin

HD-útbúgvingin er viðurkend hægri útbúgving fyri eitt nú komandi og verandi leiðarar hjá tí privata og tí almenna. Útbúgvingin er skipað sum parttíðarlestur og tekur fýra ár.



FØROYA HANDILSSKÚLI

Postsmoga 177
110 Tórshavn
Tel 31 71 77
Telefax 31 33 74

www.tsu.fo

### HD 1. partur

HD 1. partur tekur tvey ár og er sjálvstøðug grundútbúgving í vinnubúskapi. Fyrra árið eru lærugreinarnar vinnubúskapur, dátugreining og samfelagsbúskapur. Seinna árið eru lærugreinarnar vinnulívsrættur, háttalæra, vallærugreinar og verkætlan. Til ber at taka stakgreinar, tó ikki háttalæru og verkætlan.

HD 1. partur verður boðin út í samstarvi millum Føroya Handilsskúla og Handilsháskúlan, Århus Universitet. Undirvíst verður ætlandi mánakvøld og mikukvøld kl. 16.00-19.10.

Upptøkutreyt til HD 1. part er gymnasial miðnámsútbúgving, t.e. HH, HT, HIF, HF ella student.

Nýggjur flokkur byrjar í september 2008. Tilmeldingarfreistin er mánadagin 18. august 2008.

Umsóknarbløð og kunning um HD 1. part eru á heimasíðu Handilsskúlans, www.fh.fo. Umsóknarbløð við prógvum verða send Føroya Handilsskúla, Marknagilsvegur 77, Postsmoga 177, FO-110 Tórshavn.

### HD 2. partur

HD 2. partur tekur eisini tvey ár, har tú velur sergrein. Í løtuni kunnu føroysk lesandi taka sergrein í roknskapi og búskaparstýring sum fjarlestur.

Nýggjur flokkur, har til ber at taka fjarlestur, byrjar í september 2008. Tilmeldingarfreistin er 11. august 2008.

Umsóknarbløð eru tøk á heimasíðuni hjá Handilsháskúlanum, Århus Universitet, www.asb.dk. Umsóknarbløð verða send Ritu K. Madsen, upptøkuvegleiðara Handilsháskúlans, á rkm@asb.dk.

Eru spurningar, ert tú vælkomin at venda tær til skrivstovu okkara. Opið er mánadag-fríggjadag frá 8.00-16.00. Skrivstovan er tó stongd í tíðarskeiðnum 7. juli–11. august.

SENDISTOVAN